einfaldari
- ger tað einfaldari

Mars 2011

# Sakarias er ársins fyrstihjálpari 2010



*Vinmenninir Sakarias Zachariassen og Edvard Vang* *Mynd: Tórvør Vang*

Ársins fyrstihjálpari 2010 hjá Reyða Krossi Føroya var útnevndur mikudagin 9. februar. Hetjan hesaferð var Sakarias Zachariassen.

Tann 5. september í fjør hendi ein ferðsluvanlukka í Havn. Teir báðir vinmenninir Sakarias Zachariassen og Edvard Vang komu koyrandi á prutli oman eftir Sundsvegnum. Edvard koyrdi, og Sakarias sat aftanfyri. Júst sum teir skuldu koyra fram við einum bili, snaraði hesin til vinstru. Prutlið koyrdi inn í síðuna á bilinum. Úrslitið var, at báðir dreingirnir blivu slongdir av prutlinum upp um bilin. Edvard fekk skallabrot, og Sakarias bleiv slongdur nógvar metrar oman eftir gongubreytini. Hann fekk stoyt í høgru síðu og ryggin. Eisini tók høvdið.

Hóast Sakarias hevði meint seg illa, skundaði hann sær at vita, hvussu stóð til við Edvardi. Hann merkti ongan puls og ongan andadrátt, men hann royndi sum frægast at blása í Edvard og geva honum hjartamassagu, samstundis sum hann rópti á onnur, sum vóru á staðnum, um at ringja eftir hjálp. Tá Sakarias hevði roynt at fingið lív í lívleysa vinmannin eina løtu, helt hann, at har var einki at gera longur. Hann ivaðist ikki í, at Edvard var deyður. Hann setti seg við høvdinum á Edvardi í fanginum og helt um hann, til sjúkrabilurin kom, og hjálparfólk tóku yvir. Skallabrotið hjá Edvardi var so mikið álvarsligt, at hann somu nátt við flogfari varð fluttur á sjúkrahús í Danmark.

lívdin
– í livd hins hægsta
Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Brotin og uppbygd

Heilagleiki Guds bæði breyt og uppbygdi Esaias profet (Es. 6). Fyrst varð hann brotin, tá ið hann sá seg sjálvan í ljósinum av heilagleika Guds, men síðani varð hann uppbygdur, tá ið Gud nam við hann og gav honum styrki og myndugleika til heilaga tænastu. Til eina samkomu, sum er eyðkend av at vera brotin og uppbygd, fer Gud at draga bæði trúgvandi og vantrúgvandi menniskju. Henda samkoma fer saman við serafunum at kunna syngja tí tríeinda Gudi lov og prís og saman við teimum rópa: „Heilagur, heilagur, heilagur er HARRIN Gud herskaranna – øll jørðin er full av dýrd Hansara!“ (Es. 6:3).

*Jógvan Zachariassen*

# Hendingar & tiltøk

## Jógvan er doktari



Hósdagin 10. februar vardi Jógvan Zachariassen doktararitgerð sína við Dallas Theological Seminary í Texas í USA.

Ritgerðin, sum ber heitið "The Theology of Music", viðger sambandið millum tónleik og gudfrøði og hvussu ein tónleikari skal fyrihalda seg til tónleik og trúarlív í síni egnu mentan.

Vegleiðarar hjá Jógvani vóru Dr. Oscar Lopez og Dr. Ronald Man, báðir professarar í gudfrøði og tónleiki. Afturat teimum sótu í dómsnevndini Dr. Scott Barfoot, Head of Doctoral Department á Dallas Theological Seminary og tveir aðrir professarar.

Eitt serligt við hesari verjuni var, at Jógvan vardi ritgerðina úr Føroyum.Verjan fór nevniliga fram umvegis “video conference call” á Skype. Ein dómari sat í Washington, ein í Oklahoma, ein í Houston og tveir í Dallas, Texas, og Jógvan í Føroyum.

Vit ynskja Jógvani hjartaliga til lukku við avrikinum.

## Minibíbliuskúli og bønarmøti




Eitt av endamálum samkomunnar er at læra (Matt. 28: 19-20). Tí vilja vit bjóða nógvar og fjølbroyttar møguleikar at læra um Harran Jesus Kristus.

Frá 8. mars verður minibíbliuskúli týskvøld í húsunum hjá Lívdini oman Hoydalar 28. Kvøldið verður skipað soleiðis, at frá kl 18.50–20.20 verður minibíbliuskúli, og frá kl. 20.30-22.00 verður bønarmøti. Vit heita á samkomuna um at halga týskvøldið til samfelag, læru og bøn.

## Skráin fyri týskvøldini mars 2011

| | |
|---|---|
| 1. mars | Kyknubólkar |
| 8. mars | Hvussu er Gud? – Faðirhjarta Guds |
| 15. mars | Hvussu er Gud? – Sinnalag Jesusar |
| 22. mars | Kyknubólkar |
| 29. mars | Hvussu er Gud? – Kraft Andans |

## Samkomulegan




Samkomulegan hjá Lívdini verður á Zarepta vikuskiftið 11.-13. mars. Heitið á leguni er "Gud hin Heilagi". www.livdin.fo.

## Sam Vang vann



Leygardagin 12. februar skipaði Frælsur Ítróttur Føroya fyri fyrstu FM-kappingini í crossrenning í høvuðsstaðnum, tá 23 rennarar løgdu til brots á einum rættiliga fjølbroyttum teini við Studentaskúlan í Hoydølum. Hjá monnunum, sum runnu um átta kilometrar, gjørdist Sam Vang nummar eitt við tíðini 32 minuttir og 56 sekund. Vit ynskja Sam hjartaliga til lukku við sigrinum.

## Til lukku við barninum

16. januar fingu Ruth og Rabah Fjallsá Benbakoura í Havn ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3.430 gr.

26. januar fingu Rachel og Ejler Eysturtún í Hoyvík eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3.900 gr.

28. januar fingu Anna Maria og Jóan Petur Joensen í Hoyvík ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3.600 gr.

## Til børn í fyrsta flokki og foreldrini

Í Lívdini hava vit í nøkur ár havt bæði gentu- og dreingjabólkar. Nú er so ætlanin, sum eina roynd, aftur at gera nakað fyri børn í 1.flokki. Vit møtast umleið fjórðu til fimtu hvørja viku – gentur og dreingir saman.

Vit halda, at tað hevði verið deiligt, um børnini kundu komið at kennast eitt sindur og hugnað sær saman uttan fyri sunnudagsskúlan. Øll, sum koma í sunnudagsskúlan og ganga í 1. flokki, fáa hetta bjóðað. Um vit gloyma onkran, so vinarliga sig okkum frá, so ongin verður gloymdur.

Ætlanin er, at bólkurin skal skiftast um vera heima hjá børnunum. Um tað ikki ber til, so er tað eisini fínasta slag. Ongin má setast aftur at koma av tí orsøk. Vit ætla bara at hugna okkum saman, kanska spæla okkurt spæl og hoyra eina søgu. Vit fáa ein bita at eta, tí hevði verið gott, um tit kundu sagt okkum frá, um tit koma, antin við mail, sms ella telefon :-)

Er tað nakað, sum tit hava upp á hjarta, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

*Vegna fyriskipararnar*

*Súsanna Eliassen, s.eliassen@kallnet.fo*
*tlf. 310011 ella 510011*

*Siri Hjørleifsdóttir Davidsen, jens_k@kallnet.fo*
*tlf. 421712 ella 277005*

## Ókeypis bowling

Fólk í Lívdini hava fram til 1. apríl 2011 møguleika at bowla ókeypis í bowlinghøllini hvønn mánadag frá kl. 20.00 til 22.00. Bowlingbreytir verða bílagdar við at ringja til Mourits Clementsen á tlf. 224717.



# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

**Sunnudagin 6. mars**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Kreativt innslag: Absalon Áargarð*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Gud hin Heilagi*
*Talari: Símun Absalonsen*



Absalon

**Sunnudagin 13. mars**
Lívdin á Zarepta (einki møti)



Símun

**Sunnudagin 20. mars**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Kreativt innslag: Annika Nielsen*
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Gud hin Heilagi*
*Talari: Jógvan Zachariassen*



Annika

**Sunnudagin 27. mars**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Kreativt innslag*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Talari: Tom Roberts*



Jógvan

**Ungdómstiltøk:**
Alive: leygarkvøld kl. 21.00

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*



Tom

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*